## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men eisini ælingur, partvís kavi. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum ÷2 og +1 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av útsynningi og vestri og vátakavi ella regn. Seinnapartin hækkar hann upp í útnyrðing og ælingur, partvís heglingur. Hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í ein strúk av útsynningi og regn. Hitin millum 7 og 10 stig. Sunnudagin upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur. Hitin millum 3 og 7 stig.



*Um middagsleitið verða akførini sýnd fram við Hotel Vágar*

# Við ellisakførum til Gásadals

**Hósdagin, Kristi himmalferðardag, vitja ellisakfør Vágar. Tað er felagið Føroya Ellisakfør, sum skipar fyri útferð vestur í Vágar.**

ELLISAKFØR
*Tíðindaskriv*

Ætlanin er at koyra við ellisakførum úr felagshúsunum hjá felagnum yvir við Strond í Havn kl 10. Komin vestur er ætlanin at koyra gjøgnum allar størru bygdirnar í Vágum, fyrst Sandavág, síðani Miðvág og Sørvág.

Um middagsleitið verða akførini sýnd fram við Hotel Vágar, meðan ferðalagið fær sær ábit á hotellinum og vitjar á flogvøllinum.

Kl 14.30 verður farið til Gásadals. Møguliga verður koyrt við gomlu ellisakførunum út á endan, har farið verður við bussi gjøgnum tunnilin til Gásadals.

Túrurin hjá Føroya Ellisakførum í Vágum endar við vitjan á Vatnsoyra Bilasavni, har Hans Elmar Poulsen fer at greiða frá forkunnugu akførunum, hann hevur har - eins og kaffi verður at fáa, áðrenn kósin verður sett heimaftur.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 1 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 21 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 8 |
| Moskva | 9 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 22 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 18 |
| Malta | 20 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 40 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | 19 |
| New York | 17 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1000 hPa. í útsynning úr Íslandi fer eystureftir og grynnist.




Lágtrýstið við Stockholm fer eystureftir. Kuldabrúgvin haðani til Føroya fer suðureftir og hevur kalda luft við sær.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/05 kl. 06⁰⁰– 18/05 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,6°
Minsti hiti máldur í mai: ÷3,0° - Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 9,5 mm – mált frá 17/05 kl. 06⁰⁰–18/05 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 58,3 mm

HESTPRENT Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

### VESTFALLSKYRRINDI

19. mai: Tendring
21. mai: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. mai | 07.37 | 19.59 | 06.37 | 18.59 | 06.52 | 19.14 | 09.37 | 21.59 | 10.37 | 22.59 | 05.52 | 18.14 | 04.52 | 17.14 | 07.52 | 20.14 | 08.52 | 21.14 | 07.22 | 19.44 | 08.37 | 20.59 |
| 20. mai | 08.22 | 20.45 | 07.22 | 19.45 | 07.37 | 20.00 | 10.22 | 22.45 | 11.22 | 23.45 | 06.37 | 19.00 | 05.37 | 18.00 | 08.37 | 21.00 | 09.37 | 22.00 | 08.07 | 20.30 | 09.22 | 21.45 |
| 21. mai | 09.08 | 21.32 | 08.08 | 20.32 | 08.23 | 20.47 | 11.08 | 23.32 | — | 12.08 | 07.23 | 19.47 | 06.23 | 18.47 | 09.23 | 21.47 | 10.23 | 22.47 | 08.53 | 21.17 | 10.08 | 22.32 |
| 22. mai | 09.54 | 22.17 | 08.54 | 21.17 | 09.09 | 21.32 | 11.54 | — | 00.32 | 12.54 | 08.09 | 20.32 | 07.09 | 19.32 | 10.09 | 22.32 | 11.09 | 23.32 | 09.39 | 22.02 | 10.54 | 23.17 |

5 707265 100036